# Tottenham knústi Arsenal

Tottenham læt ongantíð Arsenal koma til orðanna í seinnu liga-cup hálvfinaluni á White Hart Lane í kvøld. Fyrra hálvfinalan á Emirates Stadium endaði við javnleiki 1-1. Tottenham legði út sum eitt óløgið. Longu eftir tríggar minuttir hevði Jermain Jenas lagt Spurs á odda 1-0. Í 27 minutti var danski Niklas Bendtner so óheppin at gera sjálvmál, so Spurs vóru á odda 2-0 í hálvleikssteðginum. Stutt eftir temunnin í hálvleikinum økti Robbie Keane til 3-0, og eftir 60 minuttir var alt avgjørt, tá Lennon skoraði til 4-0. Adebayor pyntaði til 4-1, men í síðsta minutti skoraði Stead Melbranque til endaliga úrslitið 5-1. So Tottenham vann samanlagt 6-2. Í morgin leika Everton og Chelsea hina hálvfinaluna á Goodison Park í Liverpool. Fyrri dysturin teirra millum endaði 1-1.




# Tvær hálvfinalur í kvøld

Bæði hjá monnum og kvinnum er hálvfinala í Coca-Cola kappingini í hondbólti á skránni í dag. Hjá kvinnum skal Stjørnan royna seg á útivølli í Vági, har tær bert hava vunnið eina ferð seinastu trý kappingarárini. Hjá monnum verður hálvfinalan í kvøld millum StÍF og rutineraða aðrudeildarliðið hjá Kyndli. Til dystin má Kyndil standa seg uttan Jakob Jónsson, sum hevur gjørt av at flyta tvær deildir upp. Í morgin eru eisini tvær hálvfinalur á skránni. Tá spæla Tjaldur og Kyndil hjá kvinnum og H71 og Kyndil hjá monnum.

(Framhald í morgin)




unum í útjaðaranum – okkurt felag má sigla í tveir tímar við ferju til sínar útidystir – ikki dáma tann veruleikan, at teirra bestu leikarar fáa sáttmála við HB og B36. Men feløgini í høvuðsstaðnum eru altíð tey best stuðlaðu, og tey við teimum bestu úrslitunum. Stovnað í 1904 er HB tað eldra av hesum báðum. B36 kom á pallin 31 ár seinni. B36 bleiv stovnað av arbeiðarastættini, sum hildu HB verða blivið ov snobbut. Teir burdu verið nevndir »B35« eftir stovningarárinum. Men »6« er eitt nógv meiri máttmikið tal í Føroyum. Og so siga viðhaldsfólkini, at »B36« ljóðar nógv betri.

### HB vunnið mest

HB er tað mest vinnandi liðið í oyggjunum við 18 meistaraheitum (í 2006 red.). KÍ, sum er frá næststørsta býnum, Klaksvík, hevur vunnið 17. Men B36 eru verandi meistarar, og vóru saman við KÍ fyrsta føroyska liðið, sum leikti Evropa Cup-dystir í 1992. Feløgini klára sum oftast væl upp, men harða kappingin merkist onkuntíð. Í august 1991 førdi B36 føroysku liguna við 7 stigum, tá teir skuldu leika ímóti HB. Nøkur kvøld áðrenn dystin fóru HB-arnir í býin at fáa sær nakrar øl. Eingin var skakkur, tá B36 legði seg á odda 1-0, men HB kom afturíaftur og vunnu dystin 8-2. Eftir hendan ósigurin skrambladi B36 saman, og endaðu við at missa meistaraheitið við einum málmuni, sum manglaði trý mál. Um teir bara høvdu tapt 5-2 ímóti HB høvdu teir verið meistarar. Og tað pínur enn. Derby´ið henda dagin er í sama vikuskifti, sum HM-fjórðingsfinalurnar verða leiktir í Týsklandi. Troyggjurnar hjá HM-luttakaranum er at síggja í einum handilsglugga í Tórshavn. Men eingin keypir troyggina hjá Ghana.

### Meistarar í oktober

Kappingarárið plagdi at verða frá apríl til september, men tað er nú longt, so leikararnir eru betri fyri til teir týdningarmiklu landsdystirnar, sum kunnu fella í mars og apríl. Tey 10 liðini í bestu deild spæla nú tríggar ferðir ímóti hvørjum øðrum í einum kappingarári, sum strekkir seg yvir 27 umfør. Hvør fær tann 14. heimadystin verður mett í mun til kappingarárið í 2005. Føroyska ligan fylgir ikki flestu ligum í Evropa. Feløgini, ið leika seg í Champions League ella í UEFA-kappingina, eru í tí bizarru støðuni at verða krýndir meistarar í oktober, og skulu ikki spæla í tí evropeisku kappingini fyrr enn 9 mánaðir seinni. Broytingar koma kanska, fyri at kunna fylgja øðrum londum. Men ikki øllum líkar tankan um at leika vetrarfótbólt. Sjálvt í dag, á hásumri, vætir sirmið hendan staðin frá morgni til myrkurs, men her skal ein hava í huga, at hesa tíðina er norðuratlantiska sólin leingi á hválvinum. Tað er altíð ljóst í Tórshavn á sumri. Kvirran er bara brotin við ferðamannaskipunum, sum eru á veg til Íslands, og sum legga at bryggju. Hesi senda sín gamla førning út í gøturnar í Tórshavn. Tjóðareyðkennini eru eyðsýnd. Amerikumenn, sum hoyrast í sølubúðunum. Koreanarar, sum flenna og taka myndir. Meðan ein trunki við spaniólum halda seg tætt saman og síggja eitt sindur óttafull út.

### Seyðirnir sláa grasið

So rólig er náttúran í hesum oyggjunum, at fremmandu ferðafólkini eru vælkomin at vitja skrivstovuna hjá stjórnarleiðaranum. Eitt øki, har smáu húsini hava eina vanliga føroyska grastekju. (Tá grasið gerst ov langt, eru tað ofta seyðirnir, sum eru plenuklipparnir!). Inntil fyri ikki so mongum árum síðani kundu oyggjabúgvarnir støkka inn á gólvið og kjakast við stjórnarleiðarin. Men nú mugu tey gjøgnum eina langa beurokratiska mylnu fyri at fáa eina avtalu við skrivaran hjá honum. »Tað kemst av, at summi av teimum vitjandi ikki vóru í so góðum lag«, sigur ein av teimum lokalu varliga við meg. Ein bólkur av enskum ferðafólkum frávelur møguleikan at vitja tann føroyska »Tony Blair«. Teir leita eftir einari barr, fyri at kunna hyggja eftir HM-dystinum millum Ongland og Portugal. Fyri 15 árum síðani høvdu teir havt stórar trupulleikar. Tá vóru ongar barrir. Og avmarkingar vóru fyri innflutninginum av rúsdrekka úr Danmark. Nú eru náttklubbar, sum hava opið inntil kl. 5 um morgunin, og føroyingar bryggja sítt egna øl, men flestu vørurnar verða innfluttar. Bílig klæðir og kjøtpottar kunnu keypast í Aberdeen, sum er tann stórbýurin, sum liggur nærmast Føroyum.

### Liverpool-fjeppari

Manhattan er stúgvað við bæði ferðafólkum og lokalum fólki. Teir flestu av teimum lokalu hita upp til dystin í morgin, men Eivind Eysturoy hyggur eftir dystinum hjá Onglandi. Hann heldur við HB og Liverpool. »Liverpool er tað best umtókta, útlendska liðið í Føroyum. Teir einastu við einum fjepparafelagi. Hetta kemur lutvíst av teirra stórliðum í 1970-unum og 1980-unum, og lutvíst av teimum donsku leikarunum, sum leiktu í Liverpool í 1980-unum sum Jan Mølby.« Eysturoy gongur ímóti familjuni við at halda við HB. »Øll familjan hjá mær heldur við B36. Og mamma mín situr í nevndini hjá B36. Men eg eri HB-ari, uppreistrarmaðurin! B36 eru teir størstu rivalarnir hjá okkum, men tað er ongantíð bardagi ímillum viðhaldsfólkini. Vit eru ógvuliga rólig her.«

### 12 leikarar uttanlands

*»Einasta vinarliga grannauppgerðin, sum eg havi upplivað.« Tað eru orðini, sum Andy Mitten setir á uppgerðina millum HB og B36*

Jákup í Stórustovu er eisini har. Hann minnist hvussu hann bleiv fótbóltsumboðsmaður, aftaná at hava verið venjari í B36. »Feløg í Noregi og Danmark byrjaðu at ringja til leikarar, og góvu teimum lyfti, sum teir ikki hildu. So summir av leikarunum spurdu, um eg ikki kundi umboða teir. Fólk hildu meg verða svakan, at eingin kundi verða áhugaður í føroyskum leikarum. Nøkur ensk feløg flentu, og hildu, at eg gjørdi gjøldur við teimum, tá eg segði teimum, at eg var ein agentur úr Føroyum. Men seinni ringdi eitt av hesum feløgunum um ein spælara.« Stórustovu hevur nú 12 leikarar uttanlands, flestu teirra eru í Skandinavia. Men aðrir hava verið í Arsenal, Liverpool og Manchester City, men eingin av hesum er komin á besta liðið. Hann fær eisini spælarar til Føroya frá fjarum londum, sum Brasilia, Nigeria og Fílabeinsstrondini. Tað letur til, at hann selur oyggjarnar væl. »Vit hava ting, sum stórbýir hava, men so hava vit eisini náttúruna. Summi fólk hava ongantíð sæð havið. Men vit líva mitt í sjónum. Eg hevði ynskt, at tað hevði verið eitt sindur lýggjari. Men ein má seta tingini upp ímóti hvørjum øðrum. Næstan ongar brotsgerðir verða framdar. Børnini spæla úti á gøtunum, og vit hava ein búskaparvøkstur.«